TILTØK

Adventkirkjan
Í kvøld kl. 19.30 talar Børge Schantz í Adventkirkjuni um evnið: Ísak og Ísmael. Ísrael og Palestina.
Leygardagin kl. 10.00 Barnabíbliutími og bíbliugransking: Vónin – nóg mikið ella ov lítið. Kl. 11.00 talar Børge Schantz um evnið: Paulus ápostul og øðrvísi trúgvandi.
Sunnudagin kl. 19.30 fyrilestur v/ Børge Schantz um evnið: er Islam ein antikristiligur átrúnaður?

Tórshavnar Sjómansheim
Evangel. møti v/ Vibeke Schaffalitzky og Inger J. Hildershavn verður týsdagin 19. nov. kl. 19.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Fríggjakvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti, kl. 21.00 Opið hús.
Sunnudagin kl. 11.00 Gudstænasta, kl. 14.00 Sunnudagsskúli og junior, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18.00 Familjumøti v/ fam. Asbjørn Mikkelsen av Skála.

Meinigheitin í Hoyvík
uppi á Brekku 3
Mánadagin kl. 20.30 Bønarmøti.
Í kvøld kl. 20.00 After Eight.
Sunnudagin kl. 11.00 Gudstænasta v/ Romain Zonnou, frá Bening. Kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti har kvinnur greiða frá ferð í Ísrael.

Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 orðsinstænasta við kommunión í Kerit.
Leygardagin kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11.00 Hámessa við biskup Czeslaw Kozon í Mariukirkjuni.
Aftaná verður kirkjukaffi.
Sunnudagsskúli kl. 14.00.

Ebenezer
Sunnudagin kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti. Heimasíðan: www.ebenezer.fo

Frelsunarherurin, Tórshavn
Sunnudagin kl. 11 og 18 møti v/ Palla Petersen.
Sunnudagsskúli kl. 14.00 og Bøn kl. 17.30.

Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti. Ímeðan er skipað barnaansing, kl. 12.00 Sunnudagsskúli og samstundis kl. 12.00 Møti. Øssur Berghamar talar. Heimasíða www.hebron.fo

KFUM og KFUK í Havn
Friggjadagin kl. 19.30 og leygardagin kl. 09.00-16.00 í KFUK: Vit gera jólaitriv við Ásu Olsen. Hetta er fyri vaksin fólk. Kostnaður 150 kr. við døgurða leygardag. Neyðugt er at tekna seg.

Rhema á Hálsi
Mikukvøldið kl. 20.00 Húsmøti hjá Ann Mari og Fríðtór Debes, Bringstún 4, Argir.
Sunnudagin kl. 17.00 Møti og sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin. www.rhema.fo

Aglow, Tórshavn
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið kl. 19.30 – allar kvinnur eru vælkomnar.

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

Meinigheitshúsið
Leygarkvøldið kl. 19.30-22.00 Juniorhugni fyri 6. flokk og eldri.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti har ung luttaka við vitnisburði og sangi.

Filadelfia, Landavegur 22
Í kvøld kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Í morgin kl. 17.00 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti v/ Allan Konrad, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18.00 Evangel. møti.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarskúlin v/ Bergur Skovgaard.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

Samkoman Immanuel
Í kvøld kl. 20.00 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

Bygdahúsið í Hesti
Leygardagin kl. 20.00 og Sunnudagin kl. 15.00 Møti, Jutta, Salli við fleiri.
Hjartaliga vælkomin.

Nazaret, Kaldbak
Á møtinum sunnukvøldið kl. 18.00 verður undirvíst úr Nehemisar bók, Zacharias Zachariassen talar.

Glæman, Kvívík
Aglow-møti verður í Glæmuni leygarkvøldið kl. 20.00 Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.
Sunnudagin kl. 19.00 verður møti í Glæmuni við Egil Toftegaard og sangbólkurin Gittit syngur.

Saron, Vestmanna
Í kvøld kl. 21.00 Ungdómsmøti við luttøku úr Evangel. húsinum.
Leygarkvøldið kl. 20.00 Møti v/ Steve Dulvich og Team-Missión.
Sunnudagin kl. 18.00 Missiónsmøti v/ Allan Konrad.
Mánadagin kl. 20.00 Bønarmøti. Telefonandaktin 424741.

Gideon
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
Hóskvøldið og fríggjakvøldið kl. 20.00 er Møti við Bergur Skovgaard, pastor í Danmark. Drekkamuður verður aftaná.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

Vágar
Ungdómsmøti verður fríggjadagin kl. 20.00 Kirstin Jensen tosar. Øll frá 7. fl. og uppeftir, eru hjartaliga vælkomin. Drekkamuður verður aftaná.

Eiði
Kirkju- og missiónsvikan heldur fram í kvøld í Karmel. Kl. 19.30 Bíbliutími: Markusar evangeliið, kl. 20.00 Møti við Havstein Ellingsgaard, Torftir.

Keldan, Skálafirði
Leygardagin kl. 15.00-17.00 Juniorarbeiði fyri børn 3.-7. fl. Vikuskiftismoti við Bergur Skovgaard, byrja leygardagin kl. 17.00 við Ungdómsleiðara-seminar, kl. 21.00 Opið hús.
Sunnudagin kl. 17.00 Møti, Barnamøti kl. 17.00 Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

Lívsins Orð, Saltangará
Fríggjadagin kl. 17.15 Barnamøti.
Sunnudagin kl. 17.00 Møti við Palla Højgaard.
Mánadagin kl. 20.00 Ungdómsmøti.

Thabor, Fuglafjørður
Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14.30, møti við Thaborkórinum er kl. 18.00 og ungdómsmøti kl. 21.00.

Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, Lovsang- og Bønarløta kl. 17.30, kl. 18.00 Møti.
Mikudagin kl. 20.00 Bíbliutími. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Betania, Skopun
Fríggjakvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti – vitjan úr Filadelfía.
Leygardagin kl. 11.00 Barnamøti 3 til 6 ár, kl. 14.00 Barnamøti 1. fl. til 3. fl., kl. 17.00 Barnamøti 4. fl. til 6 fl.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00 Sangmøti uppi í Samljóð.

Soli Deo Gloria
Hósdagin kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti, Eyðun Jacobsen talar.
Mánadagin kl. 20.00 Alphaskeið og bønarmøti.

KFUM & K í Klaksvík
Hósdagin kl. 20.00 Bíbliutími.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við Regin Høgnesen – sangur: Glyvra Streingjakór. kl. 21.00 Ungdómsmøti.

Samkoman Getsemane, Klaksvík
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
Hós- og fríggjakvøldið kl. 20.00 Møti við Bergur Skovgaard, pastur í Danmark. Drekkamuður verður aftaná.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

Café One Way, Tvøroyri
Leygarkvøldið kl. 20.00 hava Elisabeth og Sámal Jákup Joensen úr Frelsunarherinum møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánadagin kl. 15.30 Barnamøti, øll børn vælkomin.
Onskvøldið kl. 20.00 Hugnaløta fyri 10 ár og eldri.

Betania, Porkeri
Kvinnumøti verður mánadagin kl. 20.00.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 20.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Esbjerg
Føroyskur sunnudagsskúli verður í Gjesing kirkju Ulvevej 110, sunnudagin 17. november kl. 15.00. Børn í øllum aldri eru vælkomin.
Aftaná sunnudagsskúlan verður borðreitt við kaffe/te/saft og kaku.
Øll børn og vaksin eru vælkomin.
Nærri fæst at vita hjá Árant Johannessen trúb. á tlf. 75153505.

Dagtilhaldið í Vági
er opið hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15.00-18.00. Øll kunnu vera við.

Dagtilhaldið Fløvin
kemur saman mánadagfríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn
tlf. 319630/61655400.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Mánadagin 11. nov.:
kl. 10 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10-18 Vit gera súltitoy og hugsa um jólini
kl. 10.30-17 Vit tøva við nálum. Fríðgerð Rasmussen
kl. 14-18 Kortspæl, telving, bobspæl, dart og onnur spøl Tilmelding til døgurðan miku- og fríggjadagin tlf. 316491
Týsdagin 12. nov.:
kl. 10-12 Vit baka til jóla
kl. 10-11.30 Vit syngja, Óli Vang. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 **Søgur**. Eyðun Andreassen
Mikudagin 13. nov.:
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði.
kl. 15 Túrur. Sjá skránna í bløðunum
Hósdagin 14. nov.:
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-17.00 **Virka til jóla**.
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
Fríggjadagin 15. nov.:
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði.
kl. 13-17 Opið hús

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Felagið Tórshavn – spákingartúrur
Leygardagin 16. november verður ein lættur gongutúrur gjøgnum býin: Sjómansskúlin – forsøga og rundvísing.
Byrjað verður undir Pisuvarða kl. 14.30. Varaskúlastjórin Petur Hans Dahl vísir runt úti á sjómansskúlanum í Nóatúni.

Spælistovan í Meinigheitshúsinum
er opin frá kl. 9.00-12.00 mánadag, mikudag og hósdag fyri foreldrum við børnum uttan ansing.

Frá felagnum Pinkubarnadeyði
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánaði í Jákupsstovu í J. Patursonargøtu 24 í Havn. Nærri fæst at vita frá Annvør Nielsen tlf. 317261 ella Sólgerð Foldbo, tlf. 422184

Heilaskaðaráðgeving
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við aftur-venjing.
Sendið okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, BellaVista, Bellevuevej 7, 2. tv., 2930 Klampenborg, Danmark.
Tú kanst eisini ringja til: tlf. +45 39902665 (Jón) mobil: +45 24430903 (Jón)
www.neozone.dk

AA-fundir í Havn
Reinsarríið, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld kl. 20.00-21.00 og 22.30-23.30.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

Al-Anon í Vágum
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

AA-Suðuroy/Vágur
AA-fundur verður í Vágs skúla hvønn leygardag kl. 19.

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 15.00.

Blái Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

Blái Krossur – Eiði
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

ACA
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsarríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

Náttarravnarnir í Tórshavn
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr.
Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

Føroya Heimavirkisfelag
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

SMS søkir eftir Íbúð / húsi
í Tórshavn til leigu
til tvey vaksin og tvey børn.
Íbúðin / húsið má verða klárt at fyta inn í innan 28. feb. 2003.
Áhugaði verða vinarliga biðin um at ringja til tel. 22 13 99.
SMS
SMS • POSTBOKS 1059 • FO-110 TÓRSHAVN • TEL. 313041 • FAX. 317434

FILMSTEIGURIN

Van the Man

Ein »fun loving guy«, sum droymir um eitt lív um evigheitsstudentur…

Van Wilder (Ryan Reynolds) hevur í átta góð ár gingið á Coolidge College, og um tað er hann, sum ræður, so fer hann ongantíð av skúlanum. Van, sum er maðurin handan allar tær stuttligu veitslurnar, hevur uppnátt eitt nærmast legendariskt umdømi á skúlanum. Gwen Pearson (Tara Reid) tekur lesnaðin rættuliga í álvara. Hon skrivar samstundis fyri skúlablaðið og hevur, nógv ímóti egnum vilja, fingið til uppgávu at skriva eina avdúkandi grein um »Coolidge ókrýnda Kong – Van Wilder«. Tíverri fyri Van hevur pápin (Tim Matheson) smekkað pengakassan aftur. Sjey ár á college má vera rikiligt. Saman við besta vinum sínum, Hutch (Teck Holmes) og samskiftisstudentin Taj (Kal Penn) leggur Van døkkar ætlanir. Hann vil, móti gjaldi, skipa fyri superballum fyri tey lesandi og á tann hátt ætlar hann at skora kassan…

Tann fjaldi sannleikin

Claire Kubik (Ashley Judd) livur eina perfekta tilveru og hevur eina góða karrieru sum verjuadvokatur, eitt vakurt heim og fram um alt tann deiliga ektamannin, Tom (Jim Caviezel), sum hevur sítt egna entreprenørvirkið. Tað einasta, ið vantar, er brennandi ynskið hjá Clair um at fáa eitt barn, men tað arbeiða tey uppá við fullari ferð.

Men so eina náttina hava tey vitjan av innbrotstjóvum, sum flýggja, tá parið vaknar, og tað fær skriðuna at loypa – og hetta setur rættuliga tryggu karmarnar í vanda. Eitt kvøldið, á veg heim frá einum túri í býnum, verður parið steðgað av FBI-agentum, sum handtaka Tom. Skuldsetingin ljóðar uppá, at hann – undir sínum rættanavni, Ronald Chapman – undir eini loyniligari milliteroperatión – hevur staðið fyri eini masakru móit sivilum í El Salvador. Og í tey seinastu 15 árini hevur hann verið eftirlýstur fyri hesa brotsgerð.

Tom skal nú stillast fyri ein hernaðardómstól, og til stórt yvirraskilsi fyri Claire, viðgongur hann, at hann er Ron Chapman, men hann bedyrar, at hann er ósekur, at ákæran er følsk – at herurin vil gera hann tilsyndabukk fyri at fjala útyvir onrkan hægri upp í skipanini…



Frumsýning
Fríggjadagin 15.11. kl. 23[00] Leygardagin 16.11. kl. 23[00]
Sunnudagin 17.11. kl. 22[15]

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu

HAVNAR BIO
P Tlf. 311956 P
www.bio.fo



Frumsýning
Fríggjadagin 15.11. kl. 19[00] Fríggjadagin 15.11. kl. 21[00]
Leygardagin 16.11. kl. 19[00] Leygardagin 16.11. kl. 21[00]
Sunnudagin 17.11. kl. 20[00]

Fríggjadagin 15.11. kl. 22[30] Leygardagin 16.11. kl. 22[30]
Sunnudagin 17.11. kl. 21[45]

Fríggjadagin 15.11. kl. 20[15] Leygardagin 16.11. kl. 20[15]
Sunnudagin 17.11. kl. 19[30]

KOMANDI FILMAR

Frumsýning – Forsølan er byrjað
Fríggjadagin 22.11. kl. 16[00] Fríggjadagin 22.11. kl. 19[15]
Fríggjadagin 22.11. kl. 22[45]

Frumsýning – Forsølan er byrjað
Mikudagin 18.12. kl. 18[30] Mikudagin 18.12. kl. 22[15]